



## Út at ferðast í summar?

Nú tá øll gera seg til reiðar at ferðast, fer ongin avstað uttan at taka fartelefonina við. Hugsið tykkum at liggja undir suðurlenskum pálmum, uttan at familja, vinir og ikki minst arbeiðsplássið kunnu fáa fatur á tær.

Fyri at veita so góða tænastu sum gjørligt hevur Føroya Tele gjørt samstarvsavtalur við ikki færri enn 118 fjarskiftisveitarar í 55 londum, kring um í heiminum.

So, um tú ætlar eitt legg út í heim, er gaman í at taka fartelefonina við.

Av tí at prísirnir uttanlands eru sera ójavnir, kann tað vera hent at kanna:

- prísleguna hjá teimum einstøku veitarunum í teimum londunum ferðast verður til
- hvussu nógv tað kostar at móttaka samtalu, har tú ert.

Á www.tele.fo/roaming.asp sæst hvørji lond Føroya Tele hevur samstarvsavtalu við, umframt prísir.

Gott summar og góðan túr.

Teletíð og GSM-frítíð kunnu ikki nýtast uttanlands. Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum




# Kappróður er á einum vegamóti

**Hansina á Plógv, formaður í róðrardeildini hjá SÍF, heldur, at kappróðurin er á einum vegamóti, tí tað gerst verri og verri at manna bátarnar. Undanførslurnar eru nógvar. Hvør tann veruliga orsøkin til hetta er, veit hon ikki at siga. Men hon hevur nakrar hugsanir um tað**



*Hansina á Plógv, á bógbekki í bakborð, rør framvegis kapp, hóast hon fylti 50 ár fyrr í summar*

*Mynd Edvard Joensen*

KAPPRÓÐUR

*Solby A. Eliasen*

Róðrarfelagið í Sandavági hevur bert ta einu manningina við í kappróðrinum í ár. Men tó skal sigast, at tvær manningar eru til barnaróðurin, so framtíðin er kanska longu tryggjað. Men so ljóst sær Hansina á Plógv ikki upp á tað. Hon sigur, at tað hevur verið verri at manna Ørnina í ár enn undanfarin ár.

– Tað hevur ongantíð verið so torført, sum í ár. Eg veit ikki, hví tað er, sigur hon.

Hon hevur nakrar tankar um, hví so man vera. Kappróður er ein sera krevjandi ítróttargrein, sum bindur ein eitt heilt summar. Og tískil krevur hon tilrættislegging.

Í Sandavági gera tey so, at tey hava ein kunnandi fund, tá venjingin byrjar, har tað verður greitt rógvarunum frá, hvat verður væntað av teimum, og hvat tað krevur at rógva. Og tá koma nógvar undanførslur fram. Onkur lesur til próvtøku og onnur hava ikki hug at binda seg.

Men til dømis hetta við at ein ikki kann rógva og lesa samstundis, heldur Hansina ikki er nakað hald í. Hon vísir á, at ein lærari, sum í fleiri ár hevur undirvíst á miðnámsskúlanum, hevur sagt, at hann hevur havt nógvar næmingar, sum hava gingið til próvtøku, meðan tey hava róð.

– Hann segði tá, at tað var onki, sum talaði fyri, at endaliga úrslitið í skúlanum versnaði av tí orsøk, at næmingar vóru farnir at rógva. Heldur hinvegin, greiðir Hansina frá.

Tað er ikki so lætt bara at skifta ein rógvara út, tí tað má vera ein, sum er í venjing, sum kemur við. Tað eru sjey í bátinum, og tað er ikki pláss fyri útskiftarum. Og so veit ein eisini, at tá eg ikki kann venja, so kann báturin ikki fara á sjógv. Tað kann vera við til at leggja eitt ávíst trýst á, tá ein umhugsar at fara at rógva. Men soleiðis eru treytirnar allastaðni í landinum, tá tað snýr seg um kappróður.

### Set ljóskastaran á

Eisini heldur Hansina, at tað kundi verðið gjørt meira við kappróðurin í fjølmiðlunum. Hon skilir ikki, at eitt nú sjónvarpið ikki kann vísa allar róðrarnar, ístaðin fyri brot. Og at úrslit frá kappróðrinum ikki fáa eins gott pláss og til dømis fótbólturin.

– Alt fokusið er á fótbóltin, og hann er eisini tann best umtókta ítróttargreinin í landinum. Kanska hevði tað hjálpt, um meira ljós varð varpað á kappróðurin fyri at økja um áhugan, hugleiðir hon. Men so leggur hon eisini afturat, tað hon ikki hevur ta endaligu loysnina, men bert gjørt sær nakrar tankar um henda trupulleikan, sum nú hevur hug at stinga seg upp í kappróðrinum.

– Tað er ikki bara her vesturi, at tað hevur verið trupult at manna bátarnar, havi eg skilt á lagnum, sigur hon.

Hansina hevði annars vónað, at tað fór at verða lættari at manna bátin í ár, nú undirsjóvartunnilin er komin, men gongdin hevur víst á beint tað mótsatta. Og tað harmast hon um.

Men samstundis vónar hon, at tað fer at verða betur komandi ár, tí róðrarfelagið er undir menning.

Ørnin, sum er fimmmannafarið hjá teimum, er ein nýggjur bátur. Tey hava útvegað sær fýra nýggjar rógvimaskinur og í heyst vóna tey, at arbeiðið við at byggja eitt nýtt neyst kann fara ígongd.

– Sum nú er halda vit til í Rækjuvirkinum í Miðvági, og vit venja eisini í Miðvági vanliga, tí har er so veðurgott, men vit mugu fáa eitt nýtt neyst, sigur Hansina.

Gentumanningin á Ørnini liggur í løtuni á einum fimtaplássi í FM kappinginni, og tað er Hansina sum heild nøgd við.

– Vit hava verið so óhepnar við fleiri skaðum, so tað er sum heild í lagi, sigur hon. Sjálv hevur hon traðkað til, tá skaðirnir hava verið umfatandi. Hon orkar framvegis væl at rógva, og hon hevur lovað at halda fram við teimum, um so er at ongin onnur kann verða funnin.

Hansina á Plógv sær tó ikki so svart upp á framtíðina hjá kappróðrinum í Sandavági.

– Umstøðurnar eru so góðar nú, sum tær ongantíð hava verið. Nýggjan bát og nýggjar rógvimaskinur. Umframt at vit vónandi fara at byrja upp á eitt nýtt neyst einaferð í heyst. Og við tveimum barnamanningum, sum væl kunnu fara upp í FM kappróður komandi ár, so kunnu vónirnar ikki vera annað enn góðar til næsta kappingarár, sigur Hansina á Plógv at enda.



*Ørnin venur á Sandavági við Føroya elstu aktivu róðrarkvinnu umborð*

*Mynd: Edvard Joensen*